

# JAVNSTØÐU-POLITIKKUR

– tí tað loysir seg

Almannamálaráðið

# INNIHALDSYVIRLIT


Formæli Eyðgunn Samuelsen . . . . . . . . . . . . . . . . . 5
Inngangur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 6
Støðan í dag . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 8
Eitt samfelag fyri bæði kvinnur og menn . . . . . . . . . . 10
Ein fjølbroyttur arbeiðsmarknaður . . . . . . . . . . . . . . 12
Fokusøki . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 14
Virkisætlanin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 16




## ALLÝSING SAMEINDU TJÓÐA[1]

Javnstøða millum kvinnur og menn (kynjavnstøða): sipar til, at kvinnur og menn, gentur og dreingir, hava somu rættindi, somu ábyrgd og somu møguleikar.

Javnstøða merkir ikki, at eingin munur fer at vera á kvinnu og manni, men at rættindi, ábyrgd og møguleikar hjá kvinnum og monnum ikki verða treytað av, um tey eru fødd sum kall- ella kvennkyn.

Kynjavnstøða hevur við sær, at áhugamál, tørvir og tey virðir, sum mest hava at týða - bæði hjá kvinnu og manni - verða havd í huga, og at margfeldið hjá ymiskum bólkum av kvinnum og monnum verður viðurkent.

Kynjavnstøða er ikki ein kvinnuspurningur, men eitt mál, sum maður eins og kvinna eigur at vísa áhuga og av heilum huga arbeiða við.

Javnstøða millum kvinnur og menn er at meta bæði sum ein spurningur um mannarættindi og sum ein fyritreyt fyri og ábending um áhaldandi menning við støði í tí einstaka.

## SAMGONGUSKJALIÐ UM JAVNSTØÐU

Øllum borgarum skulu tryggjast javnrættindi. Hvør einstakur skal eiga møguleikan at smíða sær eitt eydnuríkt lív eftir egnum huga og evnum og at taka lut og ábyrgd í samfelagnum. Hetta tryggjar sosialt og mentanarligt fjølbroytni, sum gevur trivnað og skapanarhug.

Samgongan vil styrkja javnstøðupolitikkin, herundir javnstøðulógina. Gransking og hagtøl um arbeiðsmarknað og løn verða raðfest, eins og bæði kyn skulu eggjast til at nema sær útbúgving. Lóg um sonevnda "stalking" verður løgd fyri tingið, og ásetingarnar í revsilógini um neyðtøku verða dagførdar.

Børn hava rætt til bæði foreldrini, og samgongan vil virka fyri at styrkja hesi rættindi.[2]

---

*1 Allýsing hjá ST http://www.un.org/womenwatch/osagi/conceptsandefinitions.htm, Týðing eftir Hanus Kamban*
*2 Fylgiskjal til samgonguskjalið: http://cdn.lms.fo/media/6803/fylgiskjal-mal-at-fremja-kvf.pdf*



**EYÐGUNN SAMUELSEN**
*landsstýriskvinna í javnstøðumálum*

# Formæli

Samgongan hevur sett sær fyri at menna eitt tíðarhóskandi vælferðarsamfelag fyri alt fólkið í Føroyum, sum kann kappast við okkara grannalond um at draga fólk og virksemi til sín. Eitt samfelag við ríkum møguleikum, sterkum felagsskapi og javnbjóðis rættindum fyri okkum øll.

Skeiva aldurs- og kynbýtið er millum størstu avbjóðingar okkara, og ein virkin og greiður javnstøðupolitikkur er eitt týðandi amboð fyri at fáa ungdóm og barnafamiljur at støðast, virka og trívast í Føroyum.

Javnstøða hevur týdning fyri eitt samfelag. Hon hevur týdning, tí samfelagið verður betri at liva í, meira kappingarført, og vinnulívið meira samansett. At øll hava somu møguleikar at mennast og trívast í øllum lívsins viðurskiftum er ein fyritreyt fyri vøkstri og menning.

Hóast nógv er batnað á javnstøðuøkinum, so hava vit ikki javnstøðu í Føroyum. Vit vænta ymiskt av gentu og dreingi, og hesar væntanir ávirka, hvørjar útbúgvingar gentur og dreingir velja, og hvørjum størvum kvinnur og menn arbeiða í. Stórur ójavni er í útgoldnum lønum til kvinnur og menn. Helvtin av kvinnunum á arbeiðsmarknaðinum arbeiðir niðursetta tíð. Og fimta hvør kvinna, sum arbeiðir niðursetta tíð, ynskir at fara upp í tíð, men skipanin loyvir tí ikki.

Hetta mugu vit gera okkurt við.

Eisini síggja vit, at kvinnur ikki eru eins sjónligar í leiðandi størvum og í politikki, og menn, og her ber til at gera átøk at eggja kvinnunum til at halda seg framat. Pápar brúka bara 7% av barnsburðarfarloyvinum, meðan mammur brúka 93%. Hetta hóast vit vita, at øll familjan trívist betur, tá pápar taka størri part av barnsburðarfarloyvinum.

Javnstøða er ein hugsjón – ein grundhugsan um, hvat er eitt gott og rættvíst samfelag. Kvinnur og menn hava rætt til javnstøðu, og tað eru viðurskifti, ið eiga at bøtast hjá kvinnum, og viðurskifti, sum eiga at bøtast hjá monnum, skulu vit fáa javnstøðu.

At broyta eitt samfelag tekur tíð og krevur, at arbeitt verður á fleiri mótum og stigum, og tað er neyðugt at raðfesta. Sum landsstýriskvinna í javnstøðumálum havi eg valt at savna meg um fimm høvuðsøki:

> **Økt tilvitan um kyn og javnstøðu**
> **Javnstøða í arbeiðslívinum**
> **Menn og javnstøða**
> **Harðskapur og haturstala**
> **Lóggáva og altjóða sáttmáli**

Tað snýr seg í stóran mun um at gera fólk meiri tilvitað um tær ósjónligu forðingarnar, sum gera seg galdandi. Hetta kann gerast við upplýsing og kjaki, góðum fyrimyndum og dømum og við einari greiðari, almennari avgerð um, at øll skulu metast eftir førleikum og ikki eftir kyni. Tað hevur eisini týdning, at dreingir og menn hava ein virknan leiklut í arbeiðinum at fremja størri javnstøðu. Hetta er ein fyritreyt, um tað skal eydnast at røkka málinum um eitt samfelag, har vit hava veruliga javnstøðu.

Javnstøða er ein samfelagsavbjóðing, sum eigur at vera eitt felagsátak og eitt felagsmál. Hóast javnstøðumál er eitt málsøki hjá mær, fevnir javnstøða tvørtur um málsøki hjá øðrum landsstýrisfólkum. Tí er virkisætlanin gjørd í samstarvi við avvarðandi landsstýrisfólk umframt stovnar, feløg og nevndir, sum varða av ymsu økjunum.

Latið okkum í felag – kvinnur og menn – gera okkara til, at Føroyar gerast eitt enn betri samfelag at liva í, har kvinnur og menn trívast og hava somu møguleikar.

Tað loysir seg, snøgt sagt, ikki at lata vera!

# Inngangur

Samgongan vil, at javnstøðupolitikkur skal raðfestast høgt, og hevur sett sær fyri at styrkja javnstøðu millum kynini.[3] Nógv kjak hevur verið um javnstøðu í Føroyum seinastu árini, og ofta verður spurningurin havdur á lofti: Hava vit ikki javnstøðu í Føroyum? Tað metir landsstýrið ikki.

Tí hevur landsstýriskvinnan sett sær fyri at orða ein javnstøðupolitikk og at gera eina virkisætlan, sum lýsir støðuna og setir út í kortið, hvørji øki eiga at verða raðfest á javnstøðuøkinum næstu fimm árini.

Landsstýriskvinnan hevur raðfest fimm fokusøki, og til hvørt fokusøki eru fleiri átøk, sum skulu virka fyri at minka um gjónna millum kynini. Hesi eru øll nærri lýst í virkisætlanini, sum er fylgiskjal til henda politikkin.

*3 http://www.lms.fo*





# ▪ Støðan í dag ▪

**Seinastu árini er nógv tosað um javnstøðu. Kvinnur hava fingið rættindi, sum tær ikki altíð hava havt. Vit hava fingið eina javnstøðulóg, ið skal beina burtur allar forðingar, sum kunnu vera vegna kyn. Vit hava Demokratia, ið virkar fyri, at kvinnur bjóða seg fram í lands- og kommunalpolitikki, og at veljarin er tilvitaður um at velja kvinnur. Og vit síggja mun. Fleiri kvinnur eru valdar og sita við ábyrgd bæði á løgtingi, í landsstýri og kommunustýrum. Men hóast hesar batar eru vit ikki komin á mál.**

Fyri at eitt kjak um javnstøðu skal fáa eitt konstruktivt útgangsstøði, er neyðugt at lýsa, hvat javnstøða er. Sprota vit orðið "javnstøða", fáa vit hetta leitingarúrslit: "tað at standa javnbjóðis øðrum, javnrættur". Í hesum politikki er dentur lagdur á kynjavnstøðu, hóast javnstøða kann fevna um meira enn kyn. Javnstøða er fyri bæði kynini – kvinnur og menn hava rætt til javnstøðu.

Í veruleikanum eru fáar ítøkiligar løgfrøðiligar forðingar fyri javnstøðu. Við øðrum orðum eru fáar beinleiðis lógir, sum forða kvinnum og monnum at fáa javnstøðu. Tó eru skipanir, sum í praksis hava óhepnar avleiðingar fyri annað kynið. Eitt nú í sambandi við barnsburð, eftirsum kvinnur ikki spara nóg nógv upp til pensjón, meðan tær eru í barnsburðarfarloyvi.

Samstundis má staðfestast, at tá tað kemur til rættindi hjá pápum, eru hesi sera avmarkað. Tølini vísa, at sera fáir pápar taka meira enn tær vikurnar í barsli, sum eru markaðar teimum. Tá børn eru fødd uttanfyri hjúnalag, sum meira enn helmingurin av børnunum er, fær mamman einsamøll foreldramyndugleikan yvir barninum, um foreldrini ikki hava gjørt avtalu um felags foreldramyndugleika. Fara foreldur hvørt til sítt, búgva børnini aloftast hjá mammuni. Hetta kann ávirka sambandið millum pápa og barn.

Sum samfelag mugu vit viðurkenna, at hóast fáar formligar forðingar, eru vit ógvuliga langt frá veruligari javnstøðu.

Í Føroyum hava vit ikki javnstøðu, tá hugt verður at samlaðu lønarútgjaldingunum. Hóast bæði føroyskir





menn og kvinnur eru sera virkin á arbeiðsmarknaðinum, er stórur munur á lønarútgjaldingunum til menn og kvinnur. Hetta sæst serliga, tá tað kemur til teir hægru lønarbólkarnar, har menn eru yvirumboðaðir í mun til kvinnur.

Hetta hevur ikki bara neilig árin á kvinnurnar, meðan tær eru í arbeiðsførum aldri, men hevur eisini ávirkan á ellisdagarnar hjá kvinnum. Tær megna ikki at spara nóg nógv upp til síni ellisár, og afturat hesum liva kvinnur í meðal 5 ár longur enn menn.

Hetta ávirkar aftur útgjaldið frá pensjónsuppsparingini.

Vit hava heldur ikki javnstøðu, tá tað snýr seg um menn og heilsu, tí tað vísir seg, at menn fara ov seint til lækna, doyggja oftari av sjúkum og eru í nógv størri mun teir, sum enda í misbrúki og gerast heimleysir.

Tað loysir seg – bæði fíggjarliga og sosialt – at kvinnur og menn hava eins góðar møguleikar at smíða sær eydnuna góða. Hetta vita vit m.a. av felags norðurlendskum royndum.

Javnstøða er eitt evni, sum Norðurlond raðfesta høgt. Norðurlond hava í nógv ár samstarvað um javnstøðu og gera tað framvegis. Norðurlendsku javnstøðuráðfrýrnar og -harrarnir hittast á hvørjum ári, og Norðurlond hava víst, at íløgur í javnstøðu gera mun - tær geva burðardygd, høga lívsgóðsku og fíggjarligar fyrimunir. Javnstøða millum kvinnur og menn fremur trivnað og fíggjarligan vøkstur. Kanningar vísa, at eitt samfelag har bæði kvinnur og menn trívast, er ein fyritreyt fyri vøkstri.[4]

*4 http://www.norden.org/da/nordisk-ministerraad/ministerraad/nordisk-ministerraad-for-ligestilling-mr-jaem/arrangementer/ligestilling-er-en-vigtig-oekonomisk-parameter*

# Eitt samfelag fyri bæði kvinnur og menn

**Í Føroyum hava vit eina demografiska avbjóðing, av tí at vit hava eitt undirskot av kvinnum. Nærum 2000 færri kvinnur enn menn búgva í Føroyum, hóast fólkatalið er hækkað seinnu árini. At vit hava eitt undirskot av kvinnum í burðarførum aldri, hevur sera neiliga ávirkan á samfelagið alt sum tað er, langt inn í framtíðina. Okkum tørvar kvinnur í burðarførum aldri, skal samfelagið halda áfram at vaksa.**

Júst vantandi javnstøða er helst ein orsøk til, at fleiri føroyskar kvinnur heldur vilja búgva aðrastaðni enn í Føroyum. Tað er týdningarmikið, at vit skipa samfelagið soleiðis, at bæði kvinnur og menn kenna seg væl og kenna seg heima her, og tí hevði størri fokus á javnstøðu ivaleyst bøtt um henda trupulleika.

Kanningar í grannalondum okkara vísa, at kvinnur í størri mun enn menn hava lyndi til at flyta burtur frá útjaðaranum til miðstaðarøkið, og vit síggja sama rák í Føroyum.[5] Ein frágreiðing kann vera, at føroyska samfelagið er siðbundið við eintáttaðum vinnulívi og fiskiveiðumentan. Nógvir fyrimunir eru við hesum, men tað merkir eisini fleiri avbjóðingar. Ungu ættarliðini eru altjóðagjørd og ganga ikki longur í fótafetum foreldranna, og tey eru ikki eins støðuføst og ættarliðini undan teimum. Kvinnurnar útbúgva seg sum ongantíð áður. Einstaklingurin letur sær ikki lynda, men fer hagar møguleikarnir eru, og tað er einfalt at flyta millum lond. Hetta eiga vit at hava í huga, um vit vilja halda fram sum eitt blómandi samfelag, har fólk trívast og mennast.

Opin og tollynt samfeløg eru meira dragandi, og hetta er ikki ein serføroysk avbjóðing, tí onnur smá samfeløg og øki verða eisini avfólkað. Men meðan trupulleikin í øðrum londum er, at kvinnur flyta til stórbýirnar, er trupulleikin í Føroyum, at kvinnurnar flyta av landinum. Tað merkir færri kvinnur á arbeiðsmarknaðinum, færri kvinnur at vera makar og færri kvinnur at eiga børn.

*5 Hamilton, L.C. og Otterstad, O. (1998). "Sex ratio and community size: Notes from the Northern Atlantic" Population and environment: A journal of interdisciplinary studies, 20 (1): 11-22.5*





# Ein fjølbroyttur arbeiðsmarknaður

**Tað er umráðandi at skapa fleiri starvsmøguleikar og ein rúmligari og familjuvinaligari arbeiðsmarknað, har tað ber til at sameina arbeiðs- og heimalív. Arbeiðsmarknaðurin er sera kynbýttur - í summum vinnum eru nærum bara menn, í øðrum nærum bara kvinnur.**

Av samlaðu lønarútgjaldingunum forvinna menninir tilsamans næstan tvær ferðir so nógv sum kvinnurnar. Ein orsøk er, at sokallað kvinnustørv eru lægri lønt og hava avmarkaðar møguleikar fyri uppstíging.

Ein onnur orsøk er, at færri kvinnur enn menn eru á arbeiðsmarknaðinum, hóast føroyskar kvinnur í størri mun arbeiða uttan fyri heimið enn kvinnur í hinum Norðurlondunum.

Ein triðja orsøk er, at kvinnur í stóran mun arbeiða niðursetta tíð. Men hetta er ikki altíð av egnum vilja. Fimta hvør kvinna, sum arbeiðir niðursetta tíð, kundi hugsað sær at arbeitt meira. Ein stórur partur av størvum, har stór yvirvág er av kvinnum, eru normera sum partíðarstørv, og tað hevur víst seg at vera trupult at broyta hetta. Harafturat velja fleiri familjur, at kvinnan arbeiðir niðursetta tíð, meðan børnini eru smá. Men kvinnur eru ikki bundnar av smábørnum alt lívið.[6]

Kanningar vísa eisini, at kvinnur framvegis hava høvuðsábyrgdina av ólønta arbeiðinum í heimunum, og at helvtin av kvinnum í Føroyum dagliga arbeiðir ólønt í 3-6 tímar. Hetta hevur ikki einans ávirkan á ta einstøku kvinnuna, men eisini á samfelagsbúskapin í mistari inntøku.

*6 Frá heimasíðuni hjá Javnstøðunevndini*

# Fokusøki

**Javnstøðumál eru sera umfatandi, og tí metir landsstýriskvinnan, at skal nakað munagott fáast burturúr, er neyðugt at raðfesta nøkur øki og gera eina virkisætlan við ítøkiligum átøkum, sum kunnu setast í verk.**

Landsstýriskvinnan hevur lagt dent á hesi viðurskifti:

- **Økt tilvitan um kyn og javnstøðu**
- **Javnstøða í arbeiðslívinum**
- **Menn og javnstøða**
- **Harðskapur og haturstala**
- **Lóggáva og altjóða sáttmáli**

### Tilvitan

Vantandi javnstøða er ikki vegna formligar forðingar, og tí er neyðugt at arbeiða við at bróta niður tær óformellu forðingar, sum eru í samfelagnum. Hetta kann millum annað gerast við at upplýsa og gera fólk tilvitað um tey viðurskifti, sum forða fyri javnstøðu millum kynini. Í virkisætlanini er stórur dentur lagdur á upplýsandi tiltøk, bæði í mun til børn, ung og vaksin millum annað í mun til kynleiklutir o.a.

Børnini uppliva meira ella minni tilvitað kynleiklutirnar og vaksa upp við eini ávísari fatan av, hvat er mannfólkaarbeiði, og hvat er konufólkaarbeiði. Tað merkir, at útboðið av møguleikum til kynini verður avmarkað. Hetta hevur ikki einans við sær, at vit hava ein stirvnan arbeiðsmarknað, men eisini at vit fasthalda ein samfelagsstruktur við støðugum lønarmuni millum kvinnur og menn.

### Arbeiðsmarknaðurin

Stórur ójavni er millum kynini á arbeiðsmarknaðinum. Eitt nú forvinna menn nærum dupult so nógv sum kvinnur. Tí er neyðugt at gera arbeiðsmarknaðin meira fjøltáttaðan og broyta skeiklaða lønarmynstrið millum kynini.

Framtíðar arbeiðsmarknaðurin fer í alt størri mun at hava tørv á útbúnari arbeiðsmegi og uppskot til átøk eru, sum snúgva seg um at broyta kynbýtta arbeiðsmarknaðin. Eitt nú eru átøk, sum beinleiðis eru beind ímóti at fáa fleiri gentur at velja ikki-traditionellar útbúgvingar, so sum støddfrøði og aðrar náttúrufrøðiligar útbúgvingar. Eisini eru átøk, sum skulu eggja fleiri dreingjum sum heild at útbúgva seg. Tað er umráðandi at gera børn, ung, foreldur, lærarar og onnur meira tilvitað, soleiðis at siðbundnu kynleiklutirnir ikki halda fram at verða endurskaptir.

Nógvar kvinnur arbeiða niðursetta tíð, ofta fyri at kunna gera ólønt arbeiði. Hetta ávirkar teirra løn eins og teirra pensjónsuppsparing, sum av tí sama verður lutfalsliga lægri. Tað hevur týdning, at bæði kynini kenna ábyrgd fyri ólønta arbeiðinum, um lønarmynstrið skal broytast.



### Menn

Tað er av alstórum týdningi, at javnstøða ikki einans er eitt mál, ið kvinnur sýna áhuga, og sum snýr seg um órætt móti kvinnum. Javnstøða snýr seg um rættindi, skyldur og møguleikar hjá kvinnum OG monnum. Tí er eitt fokusøki menn og javnstøða, sum viðger evnini: pápar og barnsburðarfarloyvi, menn og heilsa og betri foreldrarættindi. Menn fáa eisini ágóðan av javnari kynbýti á arbeiðsmarknaðinum, at hava størri lut í familjulívinum, og at ótilvitað krøv til menn verða burturbeind.

### Harðskapur og haturstala

Harðskapur móti kvinnum er eitt alheims fyribrigdi og er eitt álvarsamt brot á kvinnurættindi. Harðskapur móti kvinnum er eitt javnstøðumál, tí harðskapur í parløgum er ábending um eina ójavnvág í valdsstrukturinum millum mann og kvinnu. Kyngrundaður harðskapur er eitt slag av mismuni, sum álvarsliga forðar kvinnum í at hava rættindi og frælsi á jøvnum føti við menn. Samstundis er tað umráðandi at hava í huga, at børn, sum eru vitni til harðskap, bera hetta við sær víðari í lívinum.

Seinnu árini hevur økt fokus verið á haturstalu. Hóast talan er ikki um eitt nýtt fyribrigdi, so ger tøkniliga menningin, har samskiftið gerst alt lættari og skjótari, at haturstala er ein vaksandi trupulleiki. Tað hevur stóran týdning at basa haturstalu, sum ofta eisini er kynniðrandi, tí haturstala kann fáa fólk til at halda seg aftur í at vera virkin í almenna rúminum, soleiðis at talan í roynd og veru er um skert talufrælsi.

### Karmar

Tað er neyðugt at fremja átøk, ið tryggja, at vit liva upp til altjóða sáttmálar, sum Føroyar hava bundið seg til, umframt at vit endurskoða og dagføra javnstøðulógina, sum skjótt hevur 25 ár á baki.

Føroyar hava tikið undir við CEDAW-sáttmálanum[7] - Kvinnu-rættindasáttmálanum – ið hevur til endamáls at burturbeina allan mismun móti kvinnum. Føroyar skulu í 2019 aftur til hoyringar, hvørt Føroyar liva upp til ásetingarnar í sáttmálanum, og vit eiga at arbeiða við at bøta um tey viðurskifti, sum Føroyar hava fingið viðmerkingar til, seinast hoyring var.

*7 CEDAW stendur fyri "Convention on the Elimination of All Forms of Discrimination against Women"*

# Virkisætlanin

Í hjáløgdu virkisætlan eru fokusøkini lýst eins og tey 27 átøkini, sum skulu setast í verk komandi fimm árini.

Tað hevði lættliga borið til at valt fleiri og onnur fokusøki, men við hesum fokusøkjum og átøkum metir landsstýriskvinnan Eyðgunn Samuelsen, at til ber at koma langt á javnstøðuleið.

Tó so, neyðugt er alsamt at arbeiða við javnstøðuspurningum. Ætlanin er, at henda virkisætlan skal eftirmetast, tá hon hevur virkað í fýra ár, samstundis sum nýggj virkisætlan verður gjørd.

Á henda hátt ynskir landsstýriskvinnan at skapa eitt framhaldandi arbeiði fyri øktari javnstøðu, ið verður lagað tørvinum og teimum samfelagsligu broytingunum, sum alsamt eru.

